LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Tórshavnar kommuna
Postboks 32
Vaglið
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 17. september 2024
Málsnr.: 23/17415-8
Viðgjørt: CHD

**Viðvíkjandi kommunalum stuðli til samkomuna A**
Kommunala eftirlitið í Løgmálaráðnum fekk tann 21. august 2023 teldupost við fyrispurningi frá tíðindamiðlinum B, sum snúði seg um, hvørt Kommunala eftirlitið hevði umrøtt at hyggja eftir, at Tórshavnar kommuna hevði brúkt slaka millión til eitt útiøki hjá samkomuni A í Hoyvík.

Við grundarlagi í upplýsingunum í greinunum hjá B avgjørdi Kommunala eftirlitið at taka eitt eftirlitsmál upp við Tórshavnar kommunu fyri at kanna, um Tórshavnar kommuna hevur latið ólógligan stuðul til A.

**Niðurstøða**
Kommunala eftirlitið metir, at Tórshavnar kommuna letur A ein ólógligan fíggjarligan stuðul, um kommunan ikki tryggjar sær og kunnar um, at ítøkiligu parkeringsbásarnar fram við Vegnum Langa í Hoyvík kunnu nýtast av øllum borgarum í kommununi, á jøvnum føti við samkomuna A.

**Lógargrundarlag**

- Kommunufulltrúin

**Um málið**
Talan er um eitt mál millum Tórshavnar kommunu og samkomuna A.

Málið byrjaði í 2016 við, at samkoman A vendi sær til Tórshavnar kommunu við eini áheitan um at skipa økið uttan um nýggja bygningin hjá samkomuni við parkering, partvís á kommunalum øki, sum liggur upp at økinum hjá samkomuni. Tórshavnar kommuna játtaði tá at luttaka við 200.000 krónum til gerð og skipan av uttanumøkinum. Í hesum sambandi gjørdi Tórshavnar kommuna eina brúksavtalu viðvíkjandi tí partinum av økinum, sum Tórshavnar

kommuna átti. Steðgur kemur tó í málið, tí samkoman var ikki áhugað í tilboðnum og brúksavtaluni. Málið varð tá viðgjørt í Tórshavnar býráð, sum fíggjarligur stuðul til samkomuna A.

Í 2021 tekur málið seg upp aftur. Partarnar avtala at samstarva um gerð av uttanumøkinum hjá samkomuni A, ítøkiliga at gera parkeringsbásar fram við Vegnum Langa, helvtina inni á kommunalum øki og helvtina inni á økinum hjá samkomuni A, eina avmarking við stórum steinum út móti Vegnum Langa, umframt lendisviðgerð og fríðkan av lendinum oman á kommunala reinsiverkinum. Avtalað verður, at kommunan skal gjalda fyri arbeiðir á kommunala økinum fyri í mesta lagi 1 mió. krónur íroknað mvg. Málið varð ikki lagt fyri býráðið, tí umsitingin metti, at talan var um rakstrararbeiði á kommunalum lendi.

**Málsgongd**
Eftir at Kommunala eftirlitið hevði fingið fyrispurningin frá B sendi eftirlitið, tann 31. august 2023, teldupost til Tórshavnar kommunu, og bað kommununa um at greiða frá málinum.

Tann 20. september 2023 bað Kommunala eftirlitið Tórshavnar kommunu um eisini at senda øll skjøl í málinum, umframt skjalayvirlit.

Tann 21. september 2023 sendi Tórshavnar kommuna Kommunala eftirlitinum umbidnu skjøl í málinum og frágreiðing um málið.

Tann 5. februar 2024 bað Kommunala eftirlitið Tórshavnar kommunu um at svara nøkrum uppfylgjandi spurningum viðvíkjandi frágreiðingini og skjølunum.

Tann 29. februar 2024 svaraði Tórshavnar kommuna spurningunum frá Kommunala eftirlitinum og sendi fleiri skjøl í sambandi við málið.

**Málsupplýsing**
Í 2016 stovnaði Tórshavnar kommuna eitt mál við heitinum “*Áheitan frá A um at skipa økið uttan um nýggja bygningin á matr. nr. X við parkering á kommunalum øki*”. Hetta málið varð viðgjørt á býráðsfundi tann 26. januar 2017. Býráðið tók einmælt undir við tilmælunum hjá fíggjarnevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd um at stuðla verkætlanini hjá samkomuni A við tilsamans 200.000 krónum, harav 100.000 til asfaltering og 100.000 til grønt øki. Samtykt varð eisini at gera eina brúksavtalu við treytum fyri A, tí verkætlanin fevndi bæði um privat - og kommunalt lendi. Brúksavtala varð gjørd og avtalað varð millum annað:

- at A fekk brúksrætt til uml. 2000 m2 av kommunalum øki (matr. nr. 140, Hoyvík).
- at A hevði viðlíkahaldskylduna av økinum.
- at kommunan til eina og hvørja tíð skuldi hava møguleika til beinleiðis atgongd til reinsiverkið, sum liggur uppat matriklinum hjá samkomuni A.
- at kommuna skuldi hava rætt til at nýta parkeringsøkið fram við Vegnum Langa og grøna økið tær tíðir á samdøgninum, tá ið A ikki brúkti økið.

Um hesa avtaluna skrivar Tórshavnar kommuna í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið tann 21. september 2023:

> “...
> Endamálið við hesi kommunalu luttøkuni skuldi vera, at fleiri parkeringspláss blivu møgulig.
>
> ...”

Samkoman A boðaði í november 2017 Tórshavnar kommunu frá, at samkoman ikki var áhuga í at góðkenna brúksavtaluna.

Sambært upplýsingunum í málinum kemur ikki gongd í málið aftur fyrr enn tann 17. februar 2021, tá ið stjórnarskrivstovan hjá Tórshavnar kommunu sendir teldupost til samkomuna A og biður um fund um málið.

Sambært skjølunum í málinum er fundur um málið tann 9. apríl 2021. Sambært frágreiðingini frá Tórshavnar kommunu til Kommunala eftirlitið tann 29. februar 2024 luttaka formaðurin í teknisku nevnd, stjórin á teknisku deild, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og eitt umboð frá samkomuni A. Seinni sama dag sendir A teldupost til býararkitektin í Tórshavnar kommunu og skrivar:

> “...
>
> Sum avrátt á fundinum í áðni, sendi eg viðheft eitt yvirliti yvir prosjektið til útiøkið kring A. Á næstaftasta slide, er sett upp í punkt, hvussu vit síggja gongdina og ynski okkara um samstarv og stuðul í heildarætlan fyri økið.
>
> ...”

Á næstaftasta slide, sum víst verður til í omanfyri nevnda telduposti frá samkomuni A til Tórshavnar kommunu, stendur:

> “Gongdin í málinum – samráð við kommununa – fundur 09.04.2021
>
> ...
>
> Uttan at fara ígjøgnum alla søguna, mugu vit taka afturíaftur, har málið steðgaði upp.
>
> ...
>
> Spurningurin er framvegis – vil kommunan luttaka?
> - Vil kommunan fíggja arbeiði á kommunalum økið (o.u. 1,2 mió.)?
> - Vil kommunan veita A stuðul til, at gera meira burturúr planting, laðing o.ø. (o.u. 0,8 mió.).

- = sami spurningur sum í 2016; vil kommunan luttaka við 2,0 mió., harav o.u. 0,8 mió. er beinleiðis stuðul til A.

...”

Seinni sama dag, sendir býararkitekturin í Tórshavnar kommunu, omanfyrinevnda teldupost frá A, víðari til stjóran á teknisku deild og formannin í teknisku nevnd saman við hesi frágreiðing:

“...

Fekk hetta sendandi frá A fyri løtu síðani.
Avgerðin á fundinum var, at D kannar viðurskiftir kring reinsiverki.

Annars er møguligt at skipa hetta eftir tveimum leistum:

1. Kommunan fríðkar økið og fíggjar fríðkanina.
2. Kommunan játtar A 2 mió. kr. (tal frá A), og A stendur fyri at fríðka økið, eisini kommunala partin.

Eg hugdi leysliga eftir kostnaðarmetingini – tað við gulum, meti eg er partur hjá kommununi, sum gevur áleið 1,3 mió. kr. + eini 150.000 kr. afturat til asfaltering – tilsamans í rundum tølum 1,5 mió. kr.

...”

Sambært skjølunum, sum Kommunala eftirlitið hevur fingið frá Tórshavnar kommunu, hevur stjórin á teknisku deild og formaðurin í teknisku nevnd einki skrivligt svar sent býararkitektinum uppá hendan teldupostin. Um hetta skrivar Tórshavnar kommuna í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið tann 29. februar 2024, at stjórin á teknisku deild ikki hevur sent býararkitektinum skrivligt svar uppá nevnda teldupost, men at býararkitekturin helst er kunnaður um, at stjórin á teknisku deild og býarverkfrøðingurin taka yvir málið.

Tann 7. juni 2021 skrivar stjórin á teknisku deild  í Tórshavnar kommunu til samkomuna A:

“...

Vísandi til okkara prát har TK vil vera við til at hampa um markamóti millum matrikulin hjá A og Vegin Langa, ið kommunan eigur, leggja vit upp til, at A stendur fyri arbeiðinum, ið er inni á veg-matriklinum hjá Tórshavnar kommunu.

...
Tórshavnar kommuna góðtekur omanfyri nevndu eindarkostnaðir, og tað lættasta er, at vit gjalda fyri gjørt arbeiðið tvs. at A sendir rokning til Kommununa.

...

> Kostnaðurin kemur at liggja í rundum tølum um 800.000,- kr. Max 1 millión.
>
> Lat meg hoyra hvat tú sigur til hetta.
>
> ...”

Í skjølunum, sum Kommunala eftirlitið hevur fingið frá Tórshavnar kommunu, hevur A ikki svara hesum teldupostinum frá Tórshavnar kommunu.

Í sambandi við, at Kommunala eftirlitið bað Tórshavnar kommunu um, at senda avrit av notati viðvíkjandi tí práti, sum Tórshavnar kommuna sipar til í teldupostinum tann 7. juni 2021, skrivar Tórshavnar kommuna í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið tann 29. februar 2024:

> “...
>
> Einki notat fyriliggur frá hesum práti. Talan er um ein jaligan dialog millum partarnar, har tað er eitt forstáilsi millum A og tekniska stjóran, at í og við, at parkeringsbásarnar liggja uml. helvt um helvt á kommunalum øki og øki hjá A, so skulu báðir partar tola, at parkering verður bæði í samband við virksemi hjá A og í samband við alment virksemi í økinum rundan um. Formligar avtalur um hetta verða ikki gjørdar, uttan ynski frá einum av pørtunum. Eisini er talan um jaligan dialog í samband við at kommunan ger ábøtur á reinsiverkið, sum viðførir, at kommunan í stóran mun arbeiðir inni á økinum hjá A.
>
> ...”

Tann 9. september 2021 sendir arbeiðstakari hjá samkomuni A eina rokning upp á asfaltering á kommunalum matrikli til Tórshavnar kommunu og skrivar:

> “...
>
> Eg sendi hann til tín, vísandi til tín teldupost dagf. 07.06.2021.
> Eg havi mált geiran upp. Vónandi kunnu vit gera tað á hendan hátt. Soleiðis at kommunan betalir beinleiðis til arbeiðstakaran.
>
> ...”

Tann 9. septembur 2021 sendir stjórin á teknisku deild rokningina víðari til fíggjarfulltrúan í teknisku deild og kunnar um, at avtala er gjørd við A. Fíggjarfulltrúin sendir sama dag rokningina víðari til býarverkfrøðingin. Hann kunnar um avtaluna við A og biður býarverkfrøðingin um at venda sær til leiðaran av rakstrarstøðini í Tórshavnar kommunu.

Tann 21. septembur 2021 skrivar leiðarin av rakstrarstøðini til stjóran á teknisku deild og býarverkfrøðingin:

> “...

> Fyri ordans skyld.
>
> Hvør avtala er gjørd millum kommununa og A? Eg kenni ikki til at vit hava lovað okkum rinda fyri nakað asfalt her – hetta er ikki kommunalur matrikul sum sipað verður til (ei heldur hevur hetta nakað við rakstur ella viðlíkahald at gera).
>
> ...”

Seinni sama dag skrivar stjórin á teknisku deild til býarverkfrøðingin, fíggjarfulltrúan í teknisku deild, leiðaran av rakstrarstøðini og skrivaran í Tórshavnar kommunu:

> “...
>
> Hetta er politiskt, eg skal kalla inn til fund, har eg kunni um politiskt ynski, og avtalu við A.
>
> E skal so hjálpa okkum við at finna røttu konto´ur.
>
> ...”

Um hetta skrivar Tórshavnar kommuna í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið tann 21. septembur 2023:

> “...
>
> Kjakið sum snýr seg um, at rakstrarkonturnar, umframt at rinda fyri rakstur og viðlíkahald, eisini skulu rinda fyri smærri nýgerðir upp til eina mió. kr. Hetta hevur havt nakrar avbjóðingar við sær, tí dispositiónsrætturin av játtanini tá liggur á fleiri hondum. Her er serliga talan um konturnar 6810 Kloakkir o.a. og 8110 Vegir o.a. Kallað varð tí til fundar um hetta. Í samskiftinum upp til innkallingina sigur tekniski stjórin, at hetta er politiskt, og sipar hann tá til, at tað er samtykt í fíggjarætlanunum, at hesar kontur eisini skulu rinda fyri smærri nýgerðir og tað tí er politiski viljin, at rakstrarkontur eisini skulu rinda fyri hesi arbeiði. Her skal dentur leggjast á, at víst verður ikki til, at tað er politiskt ynski frá einum ella fleiri politikarum, at arbeiði rundan um A skal gerast.
>
> ...
>
> Leiðarin á rakstrarstovninum, sum er ein operativ eind í Tórshavnar kommunu, hevur ikki verið partur av málinum um at gera lendisarbeiði oman á reinsiverkinum ella at gera garð og asfaltera á kommunala geiranum millum vegin Langa og A. Tí hevur hann ikki havt kunnleika um, at talan einans er um kommunala vegaøkið. At arbeiði ikki er rakstur er rætt, men tað er eisini rætt, at talan er um lítla nýgerð, sum rúm eisini er fyri á rakstrarkontunum.
>
> ...”

Kommunala eftirlitið bað Tórshavnar kommunu um at greiða sær frá, hvat nýgerðir t.d. kunnu umfata. Um hetta skrivar Tórshavnar kommuna í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið tann 29. februar 2024:

> “...
>
> Smærri nýgerðir umfata arbeiðir, har lutir (kantsteinar, gongubreytir, vegoyggjar, gøtuljós, garðar o.s.fr.) sum ikki hava verið fyrr verða gjørdir. Hetta er vanliga arbeiðir, sum eru í framhaldi av verandi anleggum, eru lutfalsliga smá og kosta undir eina mió. kr. Rakstrar-viðlíkahaldsarbeiðir umfata hinvegin ikki um hesar nýgerðir, men einan rakstur og viðlíkahald av verandi lutum.
>
> ...”

Sambært skjølum í málinum verður fundurin, nevndur í teldupostinum tann 21. september 2021, hildin tann 28. september 2021 hjá býarverkfrøðinginum. Evni, sambært fundarinnkallingini, ber heiti – *F Sp/f – Salgsfaktura 13949*.

Soleiðis sum málið er upplýst, er einki notat frá hesum fundi.

Tann 14. juli 2022 sendir samkoman A teldupost til trivnaðarstjóran í Tórshavnar kommunu, har A skrivar:

> “...
>
> A góðtekur, at starvsfólk í dagstovninum við Vegin Langa brúka parkeringspláss hjá A dagliga, tá stovnurin er opin. Vit vænta, at talan er umleið upp til 15 parkeringspláss, í tíðarskeiðinum frá kl. 7 til 17.
>
> Er okkurt serligt á skránni hjá A, so vit hava tørv á øllum parkeringsplássunum, kann henda, at vit taka samband við stovnsleiðaran, um at fáa starvsfólkini at parkera aðrastaðni. Hetta verður væntandi sera sjáldan. Eg havi skilt á Teknisku Deild, at tað er loyvt at parkera í vegjaðara á Djúpagilsvegi. Tað er ein loysn, sum grannar helst tola í serstøkum førum.
>
> Til tína kunning, hava vit fingið játtað frá stovnsleiðaranum, at A vísir til parkeringsplássini við stovnin, tá bilar ikki rúmast inni á økinum hjá A. Hetta hendir ikki ofta, og bert um kvøldið/vikuskifti.
>
> ...”

Hereftir verða tvær rokningar sendar til Tórshavnar kommunu, onnur tann 20. desember 2022 á kr. 549.545,00 og hin tann 21. mars 2023 á kr. 424.993,75. Báðar eru frá arbeiðstakara hjá A fyri arbeiðir á kommunala lendinum.

Í málinum sæst at enda, at Tórshavnar kommuna svarar tíðindamiðlinum B uppá eina umbøn um alment innlit í málið. Í hesum teldupostinum, dagfestur 16. august 2023, skrivar kommunan:

> “...
>
> Í einum jaligum dialogi hevur Tórshavnar kommuna gjørt eitt gerðabýti við A, har kommunan fíggjar lendisarbeiði á kommunalum matrikli, afturfyri at A loyvir kommununi:
>
> - At starvsfólk í býlingahúsinum G kunnu parkera á økinum hjá A í arbeiðstíð
> - At kommunan tryggjar sær at garðurin/vollin er so høgur, at parkeraðir bilar ikki lýsa út at Vegin Langa, og so lágur at útsýni hjá bilum er gott
> - At renovatiónsbilurin hjá kommununi sleppur framat felags reinsiverkinum – gjøgnum matrikulin hjá A.
>
> ...”

**Viðmerkingar frá Kommunala eftirlitinum**

*Kommunalur áhugi*

Ein kommuna kann bara fara undir virksemi við heimild í kommunufulltrúini, um virksemi hevur áhuga fyri borgarar í viðkomandi kommunu og kemur einum breiðum skara av borgarum í kommununi til góðar. Til dømis kann ein kommuna við heimild í kommunufulltrúini fara undir gerð av parkeringsøki.

Í ítøkiliga málinum grundar Tórshavnar kommuna samstarv sítt við samkomuna A um parkeringsøki við, at parkeringsmøguleikar mangla í økinum, serliga tá tað snýr seg um virksemi hjá Býlingshúsinum G. Kommunan fer tí undir eina felags verkætlan við samkomuna A um teir parkeringsbásar, sum eru staðsettir út móti Vegnum Langa.

Kommunala eftirlitið metir, at kommunan hevur ein kommunalan áhuga í at gera parkeringsbásar í økinum.

*Kommunalur stuðul*

Kommunur kunnu við heimild í kommunufulltrúini veita stuðul, um kommunan við stuðlinum samstundis røkir eina lógliga kommunala uppgávu.

Viðvíkjandi stuðli til partapolitiskt, átrúnaðarligt ella annað slíkt virksemi, merkt av ávísum sjónarmiðum, er meginreglan sambært kommunufulltrúini og almennum rættaraðalreglum um sakliga fyrisiting, at kommunur ikki kunnu veita stuðul til slík endamál. Til dømis verður útinnan av trúgv fatað sum privat viðurskifti, sum eru óviðkomandi fyri tann felagsskap, sum ein kommuna er. Hetta vil siga, at ein kommuna ikki kann veita stuðul til gudadýrkan, tí ongin kommunalur áhugi er í at stuðla útinnan av trúgv hjá tí einstaka, og í útgangsstøðinum er tí einki almannagagn í at stuðla kirkjum og samkomum.

Tað er tó ikki ómøguligt hjá eini kommunu at stuðla einum kirkjusamfelag ella átrúnaðarligum felagsskapi. Stuðul kann veitast í tann mun, hetta røkir ein kommunalan áhuga. Hetta kann t.d. vera atlit at býarskipanini í kommununi.

Um ein kommuna letur stuðul til eina kommunala uppgávu, sum verður røkt av einum átrúnaðarligum felagsskapi, sum eisini røkir ikki-kommunalar uppgávur, má kommunan tryggja sær, at kommunali stuðulin bara verður brúktur til at røkja viðkomandi kommunalu uppgávuna. Tá hetta vanliga ikki er møguligt í sambandi við verklagsstuðul, verður tað í praksis hildið, at ein kommuna bara kann veita rakstrarstuðul til tær kommunalu uppgávur, sum átrúnaðarligir ella aðrar felagsskapir merktir av áskoðan og sjálvsognarstovnar taka sær av at røkja fyri kommununa.

Í ítøkiliga málinum er talan um gerð av parkeringsøki beint uttanfyri bygningin hjá samkomuni A í Hoyvík framvið Vegnum Langa. Samkoman A eigur grundina undir helvtini av hesum parkeringsbásum, meðan Tórshavnar kommuna eigur grundina undir hinari helvtini av parkeringsbásunum umframt grundina, har ein marknaseting við stórum steinum er gjørd millum parkeringsbásarnar og Vegin Langa.

Soleiðis, sum málið er lýst fyri Kommunala eftirlitinum, hevur Tórshavnar kommuna bara rindað fyri tann partin av arbeiðinum, sum er gjørdur á kommunalum øki, tað vil siga asfaltering av egnum parti av parkeringsbásunum út móti Vegnum Langa, marknasetingina við stórum steinum millum parkeringsbásarnar og Vegin Langa.

Í ítøkiliga førinum er møguligt at eyðmerkja verklagsstuðulin, sum Tórshavnar kommuna hevur latið samkomuni A, nevniliga helvtina av teimum parkeringsbásum, sum eru staðsettir út móti Vegnum Langa. Við hesum parkeringsbásum røkir samkoman A eisini eina kommunala uppgávu, nevniliga at útvega fleiri almenn parkeringspláss í økinum. Kommunala eftirlitið metir tí, at talan í útgangsstøðinum er um lógligan kommunalan verklagsstuðul til parkeringspláss uttanfyri bygningin hjá samkomuni A.

Tórshavnar kommuna skrivar í frágreiðing til Kommunala eftirlitið, at ongin skrivlig avtala er gjørd um nýtslu av parkeringsøkinum. Í teldupostinum frá samkomuni A til trivnaðarstjóran í Tórshavnar kommunu, dagfestur tann 14. juli 2022, sæst tó, at A heldur seg hava ræðisrættin á umtalaðu parkeringsplássunum. A setur í teldupostinum bæði tal á parkeringspláss og treytir við almennu nýtsluna av parkeringsplássunum, m.a. at tað eru starvsfólkini í dagstovninum við Vegin Langa, sum kunnu parkera har, hvussu nógv parkeringspláss tey kunnu nýta, nær tey kunnu parkera, og at starvsfólkini kunnu vera biðin um at parkera aðrastaðni, um okkurt serligt er á skránni hjá samkomuni A.

Kommunala eftirlitið skal vísa á, at parkeringsplássini, sum eru staðsett út móti Vegnum Langa, eru felags við Tórshavnar kommunu, og at samkoman A rekur eina kommunala uppgávu saman við Tórshavnar kommunu fyri at útvega parkeringspláss til býlingshúsið G og til økið annars nærhendis. Tórshavnar kommuna má tryggja sær, at stuðulin verður brúktur til at røkja

viðkomandi kommunalu uppgávuna. Allir borgarar í kommununi mugu tí hava atgongd til at nýta parkeringsbásarnar, sum kommunan hevur verið við til at goldið, á jøvnum føti við samkomuna A, uttan at samkoman A setir treytir við, hvør kann nýta felags parkeringsbásarnar, og nær teir kunnu nýtast. Annars kann íløgan, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt í ítøkiligu parkeringsbásarnar, fatast sum óbeinleiðis stuðul til A.

Kommunala eftirlitið metir, at Tórshavnar kommuna eigur at hava skrivliga avtalu um nýtslu og atkomu til ítøkiligu parkeringsbásarnar út móti Vegnum Langa, soleiðis at íløgan hjá kommununi í parkeringsbásarnar ikki ber brá av stuðli til samkomuna A. Tað er ikki nóg mikið við jaligum dialogi, sum Tórshavnar kommuna hevur skrivað í frágreiðingini til Kommunala eftirlitið um orsøkina til, at eingin skrivlig avtala er gjørd um nýtslurætt til ítøkiligu parkeringsbásarnar.

*Mál fyri býráðið*
Upprunaliga var málið um parkeringsøkið uttanfyri samkomuhúsið hjá A lagt fyri Tórshavnar býráð til støðutakan í 2016. Tórshavnar kommuna játtaði tá at luttaka við 200.000 krónum til asfaltering og grønt øki, afturfyri at kommunan fekk rætt til at brúka parkeringsøkið og grøna økið, tær tíðir á samdøgninum, tá ið samkoman ikki brúkti økið. Tórshavnar kommuna gjørdi brúksavtalu um rættin hjá samkomuni A at brúka kommunalt øki á uml. 2.000 m2. Áheitanin varð viðgjørd sum fíggjarligur stuðul til samkomuna A. Samkoman A var tó ikki áhuga í avtaluni, og meira hendi ikki í málinum tá.

Í 2021 tók málið um parkeringsøkið uttan fyri samkomuna A seg uppaftur. Sambært upplýsingunum í málinum varð málið ikki lagt fyri Tórshavnar býráð hesaferð, men avgreitt av fyrisitingini. Orsøkin til hetta sigur Tórshavnar kommuna vera, at umframt rakstur og viðlíkahald kunnu smærri nýgerðir, upp til eina mió. krónur, rindast av rakstrarkonto´ini hjá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna upplýsir, at ”smærri nýgerðir” er arbeiði, sum ikki hevur verið gjørt fyrr og vanliga er í framhaldi av verandi verkløgum, so sum at leggja kantsteinar og gera gongubreyt, vegoyggjar og garðar.

Kommunala eftirlitið heldur, at talan hvørki var um rakstur ella viðlíkahald, tá Tórshavnar kommuna tók avgerð um at gera felags parkeringspláss saman við A út móti Vegnum Langa. Heldur ikki heldur Kommunala eftirlitið, at parkeringsplássini kundu metast at vera ein minni nýgerð, sum kundi rindast av rakstrarkontum hjá Tórshavnar kommunu, tí talan var ikki um arbeiði, sum varð gjørt í framhaldi av verandi verklagi.

Kommunala eftirlitið metir tí, at tað var skeivt, at fyrisitingin í Tórshavnar kommunu tók avgerð um at fíggja hesa verkætlan við parkeringsplássum uttanfyri samkomuna A. Verkætlanin átti í staðin at verið løgd fyri Tórshavnar býráð til støðutakan, eins og gjørt varð við sama slag av máli í 2016, men tá upphæddin var væl lægri.

**Niðurstøða**

Vísandi til gjøgnumgongdina omanfyri, metir Kommunala eftirlitið, at Tórshavnar kommuna letur A ein ólógligan fíggjarligan stuðul, um kommunan ikki tryggjar sær og kunnar um, at ítøkiligu parkeringsbásarnar fram við Vegnum Langa kunnu nýtast av øllum borgarum í kommununi og á jøvnum føti við samkomuna A.

Kommunala eftirlitið skal biðja Tórshavnar kommunu um innan 2 mánaðir at upplýsa fyri sær, hvat niðurstøðan hjá Kommunala eftirlitinum gevur Tórshavnar kommunu høvi til.

Løgmálaráðið, 17. september 2024

Nella Festirstein (sign.)
aðalstjóri